# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



## Eyðbjørn Petersen

**5. juni 1941 - 28. sept. 2009**

**in memoriam**

***Nú fýkur følv um fjallatindar,***
***nú elsti bróðir er ei meir,***
***nú kennast kaldir allir vindar***
***um farna sál og lívleyst leir.***

*Nú fórst tú elsti bróðir vár*
*ta síðstu foldarferð,*
*tín hugur væl við fjallið bar*
*í tíni góðu gerð.*

*Tú vart tann stilli millum oss,*
*tó hollur millum menn,*
*tú royndist væl við alt títt knoss,*
*tú dugdi alt í senn.*

*Tín hugur stóð til alt og øll*
*frá lív við grúgvueim,*
*til bø og ong og líð og fjøll,*
*tó mest títt kæra heim.*

*Vit skilja ei, hví fótur gleið*
*hin vonda lagnudag,*
*tí ofta fyrr tín fótur steig*
*á hesum sama stað.*

*Vit skilja ei, hvat tók tín fót,*
*har fyrr hann stinnur steig*
*og kravdi sína beisku bót:*
*títt lív á lívsins leið.*
*Vit syrgja bráða deyða tín,*
*vit sakna sárir teg,*
*nú sál so brátt um evstu sýn*
*fleyg ævinleikans veg.*

*Vit takka tær for alt tað lív,*
*vit saman fingu her,*
*og biðja at títt hús og vív,*
*Várharra styrki ber.*

*Vit minnast teg for manga stund,*
*for felags lívsins søgur,*
*vit takka tær av hjartans grund,*
*vit, allir tínir brøður.*

*At enda vit tær heilsa blítt,*
*nú lagnan legði miðið,*
*har lívið er um ævir frítt:*
*" Vár bróðir hvíl í friði".*

**Brøður tínir við familjum**

# Johannes Berg 80 ár



Mikudagin 7. oktober fyllir Johannes Berg bilasølumaður í Havn 80 ár. Jóhannes er gøtumaður - ella rættari - frá Gøtugjógv. Foreldrini vóru Benadikta og Marius Berg.

Sum ungur fór hann í bakaralæru og arbeiddi sum bakari, áðrenn hann flutti til Havnar og fór at koyra hýruvogn. Eina tíð koyrdi hann hjá Mortani Simonsen á Hotel Djurhuus, áðrenn hann keypti hann sær egnan hýruvogn.

Johannes hevur altíð verið ein undangongumaður. Saman við øðrum stovnaði hann bilstøðina Taxa, sum seinni skifti navn til Auto. Tað var í 1955/56 at fyrsta bilstøðin varð bygd, har sum Auto er enn í dag. Johannes var eisini koyrilærari og koyrdi eitt skiftið gravimaskinu, tá Oyggjarvegurin bleiv gjørdur. Annars er hann best kendur bilasølumaður. Bilasølan hjá honum byrjar, tá hann í 1959 fær umboð fyri amerikonsku Rambler bilarnar. Hann koyrdi í Auto eina tíð eftir tað, men tað var skjótt, at hann fór at selja bilar burturav. Bilasølan og verkstaðurin byrjaðu í J. Paturssonargøtu, men skjótt gjørdist ov trongligt har, tí leigaði hann ein bygning við Heygsvegin til verkstað og eykalutagoymslu.

Sølan av bilum var so góð, at hann í 1966 fekk diplom frá Rambler verksmiðjuni, American Motors, fyri at hava selt flest bilar í mun til fólkatalið í landinum. Í 1967 fekk Johannes teir fyrstu japonsku Mazda bilarnar, og í 1968 gjørdi hann sáttmála við japanararnar um beinleiðis innflutning av Mazda bilum. Umframt virksemið í Havn keypti Johannes eisini ein bilverkstað á Glyvrum, tí sølan av Mazda bilum var vorðin góð í Eysturoynni. Um hesa tíðan fekk hann eisini umboð fyri Chrysler og seldi Simca og Sunbeam bilar, sum tá hoyrdu til Chrysler-konsernina. Í hesum sambandi keypti hann eisini eina stóra nøgd av Plymouth og Dodge bilum úr Íslandi.

Í sjeytiárunum keypti Johannes elementvirkið á Norðskála. Tá bygdi hann sær tveir stórar virkisbygningar, ein á Hálsi í Havn og hin á Glyvrum, har sum verkstaðið hjá honum var – har sum Bónus er í dag. Tað kom væl við at hava stór hølir, tá hann stutt eftir fekk umboð fyri Scania lastbilar og bussar. Berg Motors er ein av størstu bilasølum í landinum og umboðar í dag bilmerkini: Suzuki, Land Rover, Subaru, Kia, Renault og Scania, umframt at teir eisini umboða Avis bilútleigan.

Hóast høga aldurin er Johannes framvegis virkin. Hann hevur fingurin á pulsinum í fyritøkuni og fylgir væl við øllum, sum rørir seg í samfelagnum. Hann giftist við Karolinu, vanliga nevnd Linnebeth, f. Mikkelsen, av Toftum. Tey fingu fimm børn: Bjarni (1955-2007), Ann Mari, Rúni, Maibritt og Magnus. Linnebeth andaðist í 2007.

Føðingardagurin verður hildin á Hotel Føroyum mikudagin kl.18, har Johannes bjóðar øllum at vera vælkomin.

*-red*

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Kirsten Vestergaard, fødd á Heygum, Tvøroyri,** andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsið mánadagin, 78 ára gomul. Kistan fer av kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi týskvøldið kl. 19. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar Kirkju mikudagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Kirstin kunnu lata sjúklingahotellinum Hotel Tórshavn í Keypmannahavn eina peningagávu, konta í Den Danske Bank 4400-311.311.4401.

**Frans Malling Mortensen, Dragør**, andaðist mikudagin, 71 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Dragør kirkju fríggjadagin 9. oktober.

**Eyðbjørn Petersen, Fuglafjørður**, andaðist mánadagin 28. september, 68 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum týsdagin kl. 17 í Fuglafjarðar kirkju. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju mikudagin kl. 14. Tey, ið vilja minnast Eyðbjørn, kunnu lata Fuglafjarðar kirkju eina peningagávu.

# MERKISDAGAR

**Silvurbrúdleyp**
Leygardagin 17. okt. kunnu hjúnini Aud og Siggvard, Joensen, halda silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í heiminum: Lauritsargøta 7, 100 Tórshavn, frá kl. 17.

**70 ára føðingardagur**
Mikudagin 7. okt. fyllir Hákun Debes, Kollafjørður, 70 ár. Dagurin verður hildin heima mikudagin frá kl. 17.

**90 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 9 okt. verður Lena Petersen, Rituvík, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin á sjókaféini í Runavík kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagurin**
5. oktober. eitur Broderus. Ókent halgimenni.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*